# Rusk flýtur javnan á bryggjuni í Porkeri



Regluliga flýtur rusk á bryggjuni í Porkeri. Grannarnir eru í øðini og vilja hava viðurskiftini í rættlag.



**Regluliga flýtur rusk á bryggjuni í Porkeri. Grannarnir eru í øðini og vilja hava viðurskiftini í rættlag. Bygdaráðsformaðurin játtar, at ruskið er ein trupulleiki:**
**– Áðrenn árið er farið, hava vit funnið eina loysn, sigur hann.**

UMHVØRVI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Ruskið stendur á bryggjuni – at kalla mitt í bygdini. Viðhvørt sær økið hampiligt út, men sum oftast er tað ein ótespilig sjón at síggja ruskið flóta allastaðni. Soleiðis hevur tað verið seinastu 20 árini, sigur Petur Meinhard Danielsen, sum býr tætt við bryggjuna. Hann leggur dent á, at allir grannarnir eru í øðini:

– Ruskið liggur bert 30 metrar frá sethúsunum. Um veturin luktar ruskið ikki so illa, men nú tað er summar, er tað fullkomiliga óliviligt her. Vit hava sent fleiri áheitanir til kommununa, men har fáa vit einki ítøkiligt svar. Somuleiðis hava vit ringt til Heilsufrøðiliga Starvsstovuna, men tey senda málið aftur til kommuna.

– IRF plagar at tøma ruskið hvønn mikudag, men longu sunnudag er bingjan full og rúgvurnar við síðuna av stórar, greiðir Petur Meinhard Danielsen frá. Hann skoytir uppí, at serliga er hann harmur um børnini:

– Børnini spæla altíð á bryggjuni, og tískil er ruskøkið teirra spælipláss. Tey spæla í lortinum og leita eftir ymiskum.

– Og tá brennistøðin herfyri var í ólagi, vóru ruskrúgvurnar fleiri metrar høgar. Fuglar, kettur og hundar drógu blæur og annað úr rúgvuni og dálkaðu økið enn meira. Nú stendur slaktið fyri framman, og tá verða rúgvurnar størri, og lepparoykurin ræðuligur, sigur Petur Meinhard Danielsen at enda.

Bygdaráðsformaðurin í Porkeri, Eli Frederiksen, játtar, at kommunan hevur fingið fleiri áheitanir, men hann hevur tó ikki hug at gera stórvegis viðmerkingar til málið. Hann sigur tó í stuttari viðmerking, at bingjuplássið ikki altíð verið so væl umsitið, og at ábyrgdin liggur hjá kommununi:

– Vit hava arbeitt við málinum leingi, men tað hevur ikki verið lætt at funnið eitt nýtt pláss til ruskbingjuna. Nú hava vit fingið eina áheitan frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, har teir heita á okkum at loysa trupulleikan. Áheitanina ætla vit at taka til eftirtektar, og áðrenn árið er farið, hava vit funnið eina loysn, lovar Eli Frederiksen, bygdaráðsformaður í Porkeri.

# Útbygging av skúlunum á Argjum og á Velbastað

**Plásstrot er í fleiri av skúlunum í Tórshavnar kommunu. Hóast Hoyvíkar skúli júst er blivin útbygdur og farið er undir at byggja nýggjan skúla í Hoyvíkshaganum, nøktar hetta ikki tann stóra tørvin á skúlum í býnum**

SKÚLABYGGING
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Fyri at nøkta tørvin skulu fleiri skúlar byggjast út, millum aðrar skúlin á Argjum. Tórshavnar kommuna leggur í løtuni ætlanir um at útbyggja Argja skúla. Kommunan skal velja ímillum tveir møguleikar: annar er at útbyggja skúlan á verandi staði og at hava allar flokkarnar frá 1. upp til 9. á sama staði.

Hin møguleikin er at byggja ein nýggjan skúla á Cepatrøðni, undir liðini á dagsstovninum á Argjum. Verður hendan loysn vald, skulu teir yngru flokkarnir, frá 1. til 3. flokk og frítíðarskúlin, vera í tí nýggja skúlanum, meðan 4.-9. flokkur skulu vera har, sum núverandi skúli er.

Býráðið fer at viðgera málið og um ein mánað, fara tey at taka støðu til, hvørja loysn tey velja. Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í mentanarnevndini hjá Tórshavnar kommunu, sigur, at arbeiðið við útbyggingini kann fara í, gongd beinanvegin ein loysn er vald. Tað tekur væntandi nøkur ár at byggja skúlan.

Kommunan hevur eisini ætlanir um at útbyggja skúlan á Velbastað. Har er møguligt at útbyggja verandi skúla ella at byggja á øðrum staði. Har eru samtyktirnar til byggingina ikki gjørdar enn, men Hildur Eyðunsdóttir sigur, at útbyggingin hevur skund og vónar, at tey kunnu fara í gongd við arbeiðið um heilt stutta tíð.

## Venjingarskúlin skal seljast

**Tórshavnar kommuna umhugsar møguleikan at selja Venjingarskúlan og í staðin fyri at byggja ein nýggjan skúla í vesturbýnum**

SKÚLABYGGING
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna eigur 40 prosent av Venjingarskúlanum, meðan landið eigur hini 60 prosentini, har læraraskúlin og pedagogskúlin halda til. Kommunan væntar, at landið vil keypa teirra part av skúlanum, og flyta fleiri hægri útbúgvingar inn á skúlan.

– Skúlin er ikki optimalur til fólkaskúla, gongirnar eru langar, tað er langur vegur út og har er eingin skúlagarður, har øll børnini kunnu fara út at spæla í senn.

Sigur Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í mentanarnevndini í Tórshavnar kommunu.

– Skúlin er nógv betur egnaður til vaksin fólk.

Ætlanin er at gera ein fólkaskúla úti á Fløtum, har pláss er fyri trimum flokkum á hvørjum árgangi. Pengar eru ikki settir av til verkætlanina enn, men Hildur Eyðunsdóttir heldur tað hava skund at fáa ein nýggjan skúla.

Hon vónar, at kommunan fer í gongd við at gera ein nýggja Vesturskúla, so skjótt útbyggingarnar av Argja skúla og Velbastaðar skúla eru lidnar.